umhvørvisstovan

# Ískoytistreytir til umhvørvisgóðkenning,

**Mál nr. 15/00389-35**

<table>
<tr><td colspan="2">Navn á virki við góðkenning:<br>**P/F Eystur- og Sandoyartunlar**</td></tr>
<tr><td colspan="2">Bústaður hjá virki:<br>Bryggjubakki 4, 100 Tórshavn</td></tr>
<tr><td colspan="2">Galdandi fyri virksemi:<br>At byggja undirsjóvartunnil millum Skálafjørð og Suðurstreymoy og annað virksemið, ið hartil hoyrir</td></tr>
<tr><td>Matr. nr.:</td><td>V-tal:<br>608580</td></tr>
<tr><td>Mál nr.:<br>15/00389-57</td><td>Galdandi frá:<br>05-12-2017</td></tr>
</table>

Suni Petersen, deildarleiðari

05/12-2017

Ingvard Fjallstein, umhvørvisviðgeri

## Heimild

Vísandi til pkt. 6.1.11 í umhvørvisgóðkenning at byggja undirsjóvartunnil millum Skálafjørð og Suðurstreymoy og annað virksemið, ið hartil hoyrir, Mál nr. 15/00389-35, kann Umhvørvisstovan geva onnur boð, enn tað sum er ásett í góðkenningini, um so er at dálkingin elvir til skaðaárin ella ampar av virkseminum, ið ikki kundu síggjast, tá góðkenningin varð givin.

## Málsviðgerð

Grót frá spreinging í Eysturoyartunlinum verður brúkt til at gera útfyllingar út á sjógv, til veg og runtkoyring til tunnilin við Sjógv á Strondum og við Fláhellu í Saltnesi. Veitarin, NCC, brúkar Nonel® plastleidningar og aðrar plastlutir, sum tendrarar og koblingsdósir, til spreingiarbeiðið í tunlinum.

Umhvørvisstovan metir, at stovnurin ikki varð nóg greitt gjørdur varugur við útlátið og árinini av leivdum av spreingiútgerð frá útfyllingum i sambandi við viðgerðina av umsókn um umhvørvisgóðkenning at byggja undirsjóartunnil millum Skálafjørð og Suðurstreymoy og tilhoyrandi útfyllingar út á sjógv til veg og runtkoyring.

Tá Umhvørvisstovan var á eftirliti P/F Eystur- og Sandoyartunlar á Strondum hin 5. oktober 2017 varð staðfest, at roynt varð at forða spjaðing av plasti frá útfyllingini við at leggja eina flótieind við fínum neti undir, út fyri syðra parti av útfyllingini, men ikki úti fyri norðara parti av útfyllingini. Veitarin metti, at meginparturin av leidningunum verður hildin aftur í útfyllingini.

Umhvørvisstovan var hin 2. november 2017 á sandinum í Skálabotni. Har varð staðfest, at sandurin í Skálabotni var meiri dálkaður av leivdum av spreingileidningum enn strendur, sum ikki hava útfyllingarvirksemi innanfyri somu fjaraskipan. Umhvørvisstovan metir tí, at tað er sannlíkt, at ein heilt stórur partur av hesum leivdum stavar frá útfyllingini av tilfari úr Eysturoyartunlinum til at gera veg, tilbúgvingarøki, runtkoyring, umframt til goymsluøki / vinnuøki á Strondum.

Umhvørvisstovan metir tó, at hetta helst bert er ein lítil partur av plastinum, sum er skolað út. Plast er ein stórur og vaksandi lívfrøðiligur trupulleiki í høvunum kring heimin. Í okkara grannalondum verður stórur dentur lagdur á, at avmarka útlátið av plasti.

Út frá omanfyrinevndu viðurskiftum hevur Umhvørvisstovan tikið avgerð um, at seta niðanfyristandandi ískoytistreytir til umhvørvisgóðkenning at byggja undirsjóartunnil millum Skálafjørð og Suðurstreymoy og annað virksemi, ið har til hoyrir, Mál nr. 15/00389-35.

### Viðmerkingar til hoyringarskriv

Umhvørvisstovan sendi hin 13. november 2017 uppskot til ískoytistreytir til P/F Eystur- og Sandoyratunlar til hoyringar m.a. vísandi til pkt. 6.1.11 um at nýggjar upplýsingar vóru komnar fram um dálkingarárin. Í svarskrivi hin 21. november ger P/F Eystur- og Sandoyartunlar vart við, at fyribyrging av spjaðing plasti frá spreinging og útfylling eru viðgjørd í skrivi: Miljøkrav satt i konkurransegrunnlagene, Oversigt, dagfest 26. mai 2017, sum Umhvørvisstovan fekk 6. juni 2017.

Umhvørvisstovan staðfestir, at á síðunum 27 og 28 í nevnda útgjøðingartilfari, verða omanfyrinevndu viðurskifti viðgjørd.

Umhvørvisstovan tekur til eftirtektar, at hon er kunnað um, at krøv eru sett til arbeiðstakaran um, at hann skal fyribyrgja, at dálking ella ampar standast av leivdum frá spreingileidnum við meira, bæði tá sprongt verður, og tá fylt verður út á sjógv.

Umhvørvisstovan staðfestir eisini, at treytirnar í nevnda útbjóðingartilfari og ískoytistreytirnar frá Umhvørvisstovuni í stóran mun eru samanfallandi. Tó er treytin um skráseting ein eyka treyt frá Umhvørvisstovuni.

Umhvørvisstovan heldur fast við, at hon sambært pkt. 6.1.11 kann seta ískoytistreytir til umhvørvisgóðkenning at byggja undirsjóartunnil, tí Umhvørvisstovan er vorðin varug við ampar og dálkingarárin av spreingileidningum við meira, sum hon ikki kendi nóg væl frammanundan.

Umhvørvisstovan heldur tí fast við at seta ískoytistreytir til umhvørvisgóðkenning: At byggja undirsjóvartunnil millum Skálafjørð og Suðurstreymoy og annað virksemið, ið hartil hoyrir, Mál nr. 15/00389-35.

## Ískoytistreytir

1. P/F Eystur- og Sandoyartunlar skal tryggja, at nøgdin av Nonel-spreingileidingum, tendrarum, koblingsdósum og øðrum plasti, sum endar í grótinum, er so lítil sum gjørligt í sambandi við spreinging í tunlinum t.d. við at endurskoða verandi mannagongdir.
2. Harafturat skal P/F Eystur- og Sandoyartunlar savna og burturbeina møguligt avlop ella fráskurðir av Nonel-spreingileidningum v. m., áðrenn sprongt verður. Burturbeindar Nonel-leidningsleivdir v.m. verða skrásettar í vekt.
3. P/F Eystur- og Sandoyartunlar skal í seinasta lagi 1. januar 2018 tryggja, at møguligar Nonel-leidningsleivdir v. m., sum verða skolaðar leysar frá grótfylling í sambandi við vegagerð út til og við runtkoyringarnar hjá tunlinum við Sjógv og í Saltnesi, verða hildnar aftur so nær útfyllingini sum gjørligt, t.d. við eini forðing.
4. P/F Eystur- og Sandoyartunlar skal regluliga savna Nonel leidningsleivdir v. m., sum verður hildnir aftur t.d. innanfyri forðing, og skráseta nøgdina av hesum í vekt.
5. P/F Eystur- og Sandoyartunlar skal regluliga fylgja við, um Nonel- leidningsleivdir v. m. reka upp á land á útsettum støðum á Skálafjørðinum, og savna og skráseta nøgdina av hesum í vekt.
6. Innsavning og skráseting av Nonel- leidningsleivdum v. m. skal vera ein partur av árligu umhvørvisfrágreiðingini sambært pkt. 6.11.3 og 6.11.4.

## Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.